
LM-025/2025


LÆR TEG

MÓÐURMÁLS-ALFABETIÐ


Aa




Áá



Bb



Cc



Dd



Ð ð




Ee




Ff



Gg




Hh



Ii



Íí




Jj




Kk




Ll



Mm



Nn




Oo




Óó



Pp




Qq




Rr



Ss



Tt



Uu



Úú




Vv



Ww



Xx




Yy



Ýý




Zz




Ææ



Øø



ei



ey



oy



MÁLFELAGIÐ – MÓÐURMÁLINUM AT FRAMA

a á b c d ð e f g h i í j k l m n o ó p q r s t u ú v w x y ý z æ ø

TEKNINGAR: ÓLI P. | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705 | FØROYAPRENT

Hví læra seg móðurmálsalfabetið?

Málfelagið – móðurmálinum at frama hevur í mong ár arbeitt við at menna móðurmálið. André Niclasen (1938-2013), málfrøðingur, stovnaði felagið. Bókin hjá André „FØROYA MÁL Á MANNA MUNNI" (2007) er eitt ítøkiligt ískoyti til debattina um móðurmálið, málrøkt og móðurmálsalfabetið.

Á forsíðuni á hesum skrivi hava vit lýst tilknýtið hjá teimum einstøku bókstavunum til tað føroyska umhvørvið og dagligdagin við viðkomandi myndum og hugtøkum.

Dagligt samskifti á føroyskum, tey føroysku fólkanøvnini og øll okkara fakmál krevja fult alfabet. Eitt skert alfabet ella stavrað megnar ikki at endurgeva tað føroyska málið. Tí er neyðugt, at vit øll halda fast við móðurmálsalfabetið. Ein stórur partur av føroyingum tekur undir við hesum, og ein kanning hjá Lóður á vári 2014 vísti, at 64% taka undir við, at c, q, w, x og z skulu verða við í alfabetinum, meðan 26% søgdu nei.

Meirilutin í Málráðnum heldur tó fast við sítt tilmæli frá 2013 og krevur, at móðurmálsalfabetið verður skert við fimm bókstavum (c, q, w, x og z). Minnilutin í Málráðnum ynskir at varðveita móðurmálsalfabetið, t.v.s. tað vanliga latínska alfabetið, í fullari longd eins og allur vesturheimurin, íroknað teir føroysku serbókstavirnar.

Málfelagið og 2/3 av øllum føroyingum hava somu fatan sum minnilutin í Málráðnum, ið ynskir, at c, q, w, x og z framhaldandi eru partur av okkara móðurmálsalfabeti, og tí hava vit valt at endurgeva minnilutatilmælið niðanfyri, sum lýsir, hví hetta hevur so stóran týdning fyri tað føroyska málið og okkara málsliga samleika.

Málfelagið – móðurmálinum at frama

Tórshavn tann 29. 09. 2015

Dan Reinert Petersen, *formaður.* Randi Meitil, *skrivari.* Regin Eikhólm, *kassameistari.*

Tilmælið hjá minnilutanum í Málráðnum sent Bjørn Kalsø, mentamálaráðharra, tann 15.11.2013

„Vit, minnilutin í Málráðnum, mæla til at hetta verður tað løggilda føroyska stavraðið:

a, á, b, c, d, ð, e, f, g, h, i, í, j, k, l, m, n, o, ó, p, q, r, s, t, u, ú, v, w, x, y, ý, z, æ, ø

Eitt alfabet er ikki nøkur natúrlóg, men ein praktiskur listi við teimum bókstøvum, sum eru í brúki í einum máli. Taka vit Føroyska orðabók (FO), so finna vit í leitorðunum 34 bókstavir brúktar. Tað er sostatt ikki samsvar millum veruleikan í sjálvari orðabókini, og tað sum stendur í rættskrivingar-reglunum í somu bók, nevniliga at „Í føroyskum skriftmáli verða 29 bókstavir nýttir." Í leitorðunum í teirri prentaðu útgávuni eru bara 29 av bókstøvunum talmerktir, hvør eftir sínum stað í raðnum, t.e. frá 1 til 29, meðan fimm stavir einki nummar hava. Tað var í ásannanini av, at samsvar ikki er millum hetta og veruleikan í sjálvari orðabókini, at henda talmerking varð strikað, tá ið FO varð endurskoðað 2009-11 av einum arbeiðsbólki á Føroyamálsdeildini. Tað var í ásannanini av, at orðabókin í roynd og veru hevur 34 bókstavir, at talmerkingin varð strikað. Tað er hesin veruleiki í modernaðum føroyskum, sum skal góðtakast.

At V. U. Hammershaimb ikki tók stavirnar c, q , w og z við (x hevði hann við), var, tí at hansara skriftmál var skapt til at endurgeva siðbundið føroyskt mál við sínum arvorðum. Men føroyskt í dag er annað og meira enn arvorðini. Tað verður í dag myndað av arvorðum, tøkuorðum og fremmanda-orðum. Og í summum av hesum verða stavirnir c, q, w, x og z brúktir. Tað er tann málsligi veruleikin í dag, sum vit eiga at viðurkenna. Reglur eiga at gerast fyri, nær stavirnir skulu nýtast, og nær ikki. T.d. nýta vit c í c-vitamin, c-moll, celsius, CO_2 og cm. Vit nýta s fyri c í vanligum tøkuorðum sum sitrón, sitat, sement og sosialur. W nýta vit í watt og x í marxisma og sex. Stavirnar ks nýta vit í taksa, maksimalur og t.d. postboks. Sama prinsipp er galdandi fyri z og q, t.e. ortografisk purisma, sum longu er framd í verki í føroyskum orðabókum. Tann komandi Rættskrivingarorðabókin fer at vísa, nær omanfyri nevndu stavir og aðrir verða nýttir.

Viðvíkjandi kjakinum, sum var fyri nøkrum árum síðani um stavraðið, kann verða víst til samrøðu í Degi og Viku við Jógvan í Lon Jacobsen, formann í táverandi Málnevnd, og til grein eftir Jeffrey Henriksen í bløðunum um sama mundið, har teir síggja tað sum eina sjálvfylgju, at hesir nevndu bókstavir verða viðurkendir sum partur av stavraðnum (Jeffrey setti stavirnar upp sum eitt ørindi, ið kundi syngjast). Eisini er okkara tilmæli í samsvari við niðurstøðuna hjá einari samdari mentanar-nevnd hjá løgtinginum í 2009.

Okkara uppskot er, at stavraðið, sum er nevnt fyrst í hesum tilmælinum, verður viðurkent og løggilt. Eisini er hetta eitt stavrað, sum allir føroyingar kenna seg aftur í. Hetta hevur als ongar negativar fylgjur fyri føroyskt sum mál, tí tað er longu praktiserað í orðabókum, tekstum og málinum yvirhøvur.

Við heilsan

Randi Meitil, Hjalmar P. Petersen og Eivind Weyhe, øll limir í Málráðnum."

Stuðlað útgávuni hava:

Edmund Joensen, Rolf Guttesen, Sjúrður Skaale, Henrik Old, Rósa Samuelsen, Heðin Mortensen, Bjarni Djurholm, Bárður Nielsen, Annfinn Brekkstein, Heðin Zachariasen, P/F Wenzel og nøkur ónevnd.